## Avtalurnar hildu ikki

**Hjálparvenjarin hjá ÍF dugir ikki at minnast, nær hann seinast er farin so vónbrotin av vøllinum, sum hann kendi seg vera eftir tapið ímóti EB/Streymi**

ÍF
*Jóannes Hansen*

Petur Simonsen, ÍF venjarin, var burturstaddur. Tí var tað hjálparvenjarin, Sonni Jensen, sum hevði ábyrgdina av ÍF liðnum:

- Eg var so vónbrotin, sum eg kanska ongantíð áður havi verið í fótbólti. Í 1. hálvleiki gekk tað, sum vit høvdu ætlað, og tað haldi eg, at tað eisini gjørdi fyrstu løtuna eftir stegðin. So kiksaðu avtalurnar. Vit megnaðu ikki at varðveita bóltin og at flyta fólkið tað fram, sum vit høvdu avtalað, og í fleiri deyðbóltsstøðum vóru teir vandamiklir og skoraðu. Tað gjørdu teir eisini, tá ið vit vóru á Eiði, og vit høvdu tosað nógv um, at hetta ikki skuldi endurtaka seg, og hvør skuldi hava ábyrgdina av hvørjum, sigur Sonni Jensen, sum serliga harmast um, at mótstøðumenninir í evstu løtu skuldu fáa sigursmálið:

- Vit høvdu havt vandamikið fríspark, og so fingu vit síðsta hornasparkið. Tá kendist tað sum um, at hetta fór at vera síðsta royndin av øllum. Kanska fóru onkrir fram, sum høvdu hildið seg aftari, tá ið vit høvdu frísparksroyndina, og so var tað Sorin fekk málið, sum hann avgjørt ikki skuldi havt fingið.

Sonni Jensen staðfestir, at teir nógvu av undanfarnu ferðunum hava megnað at staðið seg betri enn mótstøðumenninir síðsta partin av tíðini, men at tað ikki var soleiðis hesa ferð.

- EB/Streymur vóru óførir, tá ið teir komu afturíaftur. Kanska investera ikki allir okkara nóg nógv síðstu løtuna, men vit skuldu havt avgjørt hetta í 1. hálvleiki, tá ið vit høvdu møguleikar at gera í hvussu so er fýra mál, heldur Sonni Jensen.

ÍF-EB/Streymur 2-3 (2-0):

# ÍF hevur mist fótafestið

**Eftir at teir høvdu verið kroystir og vóru hepnir bara at vera aftanfyri við tveimum málum, reistu teir í EB/Streymi seg, og so fóru teir við øllum**

ÍF-EB/STREYMUR
*Jóannes Hansen*



*Við fyrsta málið sínum hetta kappingarárið fekk Sorin Anghel í evstu løtu drigið øll stigini úr Fuglafirði*
*Mynd: www.eb-streymur.fo*

Tað var nógv upp og niður í Fuglafirði sunnudagin. Heimaliðið tóktist, tá ið tað var hálvleikt, at hava buktina og báðar endarnar. Teir reyðu gingu upprættir og fegnir undir tak til hálvleikshvíldina. Tá ið spælararnir komu aftur á vøllin, hevði Piotr Krakowski skift út í tveimum sentralum plássum. Veteranarnir Egil á Bø og Jákup Martin Joensen vórðu settir í ávikavíst miðverjuna og á sentrala miðvøllin, og í 2. hálvleiki var tað sum dagur og nátt. ÍF misti alt meiri, sum hálvleikurin leið, og EB/Streymur tók alt meiri á seg, og í síðsta minuttinum av tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat, megnaðu teir at skjóta sigursmálið:

Støðan undirstrikaði, at tað var við høvdinum undir arminum, at heimaliðið ætlaði at skjóta triðja málið og harvið fáa øll stigini. Teir fingu horna í vinstru. Tað var illa sent innfyri. Hans Pauli Samuelsen fekk bóltin út á miðjuna, hann sendi til Sorin Anghel í høgru. ÍF tóktist royna at seta rangstøðufellu, men hon kiksaði, tí Sorin var aftanfyri miðstrikuna, tá ið hann fekk bóltin. Sorin hevði tveir eftir sær, og hann átti at havt lagt yvir um til Sonna L. Petersen, sum var púra leysur í mótsatta borðinum. Men Sorin valdi at skjóta, og bólturin brast í netið aftanfyri ÍF málverjan, sum hevði flutt seg eitt sindur úr miðjuni á málinum. Ivaleyst tí hann roknaði við, at hann skuldi verja fyri skotroynd frá Sonna L. Petersen.

EB/Streyma spælararnir og teirra viðhaldsfólk kring vøllin stórfegnaðust. Teirra 2. hálvleikur hevði verið væl eydnaður, og sum seinna umfarið leið, og gestirnir tóku seg alt meiri inn á ÍF, so øktist intensiteturin, og síðstu løtuna var pulsurin høgur, og talan var um satt drama.

ÍF spælararnir hingu við høvdinum, og tað var væl skiljandi, um fuglfirðingarnir kring vøllin fóru hugtungir til hús, eftir at dómarin hevði bríkslað fyri síðstu ferð.

Eftir fyrru trý korterini hevði alt bent á heimasigur. Magni á Lakjuni hegnisliga og uttan stórvegis hóvasták eftir tvørbólt frá Sylla og ímillum fleiri viðspælarar og mótstøðumenn til 1-0 og 2-0 eftir besta ÍF álopið, tá ið teir fluttu bóltin millum sín einar átta ferðir, áðrenn Gunnar Nielsen sneiddi framvið tveimum og eitt sindur uttanvert brotsteigarmarkið sendi flatt í málið.

ÍF hevði møguleikar at skjóta fleiri mál enn hesi bæði. Sylla var einsamallur við Gunnari á Steig, sum vardi væl fyri, og tað tóktist sum um, at langskotsroynd hjá Símuni Eliasen skuldi enda við máli, men Gunnar á Steig hálvbjargaði sera væl.

### Vendingin

Í 2. hálvleiki, og serliga seinna partin av honum, hevði EB/Streymur væl betri hugburð, enn teir á heimaliðnum høvdu. Sum seinna umfarið leið, kendist tað í fleiri førum sum um, at heimamenninir ikki løgdu ta orku og nærlagni í nærdystirnar, sum var neyðugt. Harafturat megnaðu teir illa at varðveita bóltin ímillum sín, tá ið teir komu fram á mótstøðuhálvuna. Rappfótaðu útlendsku álopsspælararnir vóru í so sjálvsóknir, og ov nógvir vóru ikki nóg neyvir.

Fyrsta fráboðanin um, at EB/Streymur kundi verða vandamikið, kom, tá ið tað restaðu nakrir fáir minuttir av fyrra umfarinum. Sorin Anghel streyk ígjøgnum mitt fyri. Hann og Poul Ennigarð stríddust. Teir fóru um koll, og bólturin trillaði skeivu megin stólpan. Dómarin brikslaði avgjørdur, rann ímóti Poul Ennigarð og hevði fingið reyða kortið úr lummanum, tá ið ÍF liðformaðurin, Bartal Eliasen, spenti seg út og bað dómaran, sum hevði verið væl plaseraður, fara at spyrja seg fyri hjá linjudómaranum, sum á ongan hátt hevði havt sama møguleika at síggja tað, sum gekk fyri seg í ÍF brotsteiginum, sum dómarin hevði havt tað.

Linjuverjin segði seg einki hava sæð. Tað tók dómarin til eftirtektar og yvirtrumfaði harvið tað, sum hann sjálvur tóktist hava sæð. Reyða kortið fór aftur í lumman, og í staðin fyri útvísing og brotsspark ímóti sær, so hildu fuglfirðingarnir á við fullari styrki, men tað vísti seg ikki at vera nóg mikið.

Skjótt eftir steðgin smekkaði Hans Pauli Samuelsen úr stórari fjarstøðu í vinstru og í tvørtræið, og so var tað, at liðformaðurin og serliga í 2. hálvleiki strídsmaðurin á miðvøllinum, Knút Vesturtún, eftir innlegg úr vinstru og ÍF pjakarí úr eitt sindur í høgru smekkaði upp í handara krókin. Eitt flott mál og lítla løtu seinni var um reppið, at Pacek javnaði eftir horna í vinstru, men ÍF bjargaði á málstrikuni.

Í skjótum álopi, har ÍF var yvirmannað, høvdu teir møguleikan at økja til 3-1, men í staðin fyri at spæla í høgru ella vinstru, har viðspælarar vóru blankir, royndi Sylla við skoti úr rættuliga stórari fjarstøðu. Í næsta álopinum fekk EB/Streymur horna í høgru, og í staðin fyri stóru ÍF miðverjarnir so var tað Knút Vesturtún, sum var hægstur og stútaði til 2-2.

So reið tað um snarið. Ofta vóru sendingarnar skeivar, og sum so ofta fyrr, so var tað eftir deyðbóltsstøðu, at stigini vórðu plaseráð. ÍF horna endaði við Sorin Anghel álopið og skotroynd, sum bar við sær, at øll stigini fóru úr Fuglafirði og norður til Eiðis. Eftir at teir høvdu verið í kolkjallaranum eina løtu í 1. hálvleiki, endaðu EB/Streyma menninir omaná, og eftir at ÍF hevði havt alt á hondum, mistu teir alt á gólvið. Tað ber ikki til at kenna gongdina meiri upp og niður og niður og upp!

### Fakta um dystin

**ÍF-EB/Streymur 2-3 (2-0)**
Dómari: Páll Augustinussen
1-0: Magni á Lakjuni 5.
2-0: Gunnar Nielsen 36.
2-1: Knút Vesturtún 68.
2-2: Knút Vesturtún 82.
2-3: Sorin Anghel 90.
ÍF: Allan Joensen – Eyðolvur R. Petersen, Poul Ennigarð, Bartal Eliasen, Fritleif í Lambanum – Hanus Eliasen (Atli Petersen, 83.), Símun Eliasen, Høgni Zachariassen, Magni á Lakjuni – Gunnar Nielsen, Sylla Amed Davy
Gult kort: Poul Ennigarð, Fritleif í Lambanum, Bartal Eliasen
EB/Streymur: Gunnar á Steig – Gert Hansen, Andrej Pacek, Fróði Clementsen (Egil á Bø, 46.), Bárður Olsen – Hallur Jacobsen (Teitur Joensen, 73.), Knút Veturtún, Marni Djurhuus (Jákup Martin Joensen, 46.), Hans Pauli Samuelsen – Sorin Anghel, Sonni L. Petersen
Gult kort: Knút Vesturtún, Andrej Pacek

# Sum dagur og nátt

**Veteranurin á EB/Streyma miðvøllinum sigur seg ongantíð hava upplivað so ymiskar hálvleikar, sum hann gjørdi í Fuglafirði sunnudagin**

EB/STREYMUR
*Jóannes Hansen*

Hatta var sum dagur og nátt. Tað er fyrsta staðfestingin, tá ið Jákup Martin Joensen, sum eftir steðgin varð skiftur inn á EB/Streyma miðvøllin, skal greiða frá, hvussu hann upplivdi sunnudagin í Fuglafirði:

- Í 1. hálvleiki sótu teir á øllum. Teir vunnu 90 prosent av nærdystunum, og teir høvdu møguleikar at skjóta fýra ella fimm mál. Vit kunnu takka málverjanum, Gunnari á Steig, fyri, at vit ikki vóru aftanfyri við fleiri enn tveimum málum, heldur Jákup Martin Joensen, sum leggur afturat:

- Eg hitaði upp í steðginum, so eg veit ikki heilt neyvt, hvussu orðini fullu, men okkara vóru samdir um, at hetta bar ikki til, og at vit vóru noyddir at taka okkum saman. Tað haldi eg, at vit gjørdu. Hugburðurin var heilt øðrvísi. Í 2. hálvleiki vóru tað vit, sum vunnu 90 prosent av nærdystunum, og vit høvdu fleiri góðar málmøguleikar. Eg haldi ikki, at eg nakrantíð í ein heilan hálvleik havi upplivað at verið so nógv í brotsteiginum hjá mótstøðuliðnum, sum vit vóru í Fuglafirði, sigur Jákup Martin Joensen.

Hann og Egil á Bø vóru settir inn eftir steðgin. Egil kom inn í verjuna fyri Fróða Clementsen, sum ikki kendi seg væl og bað um at sleppa út.

Ert tú nøgdur við gongdina higartil?

- Vit hava ikki verið støðugir, og vit hava fleiri ferðir ikki spælt væl. Men vit kunnu ikki klaga um úrtøkuna tvær tær seinastu ferðirnar. Ímóti VB á heimavølli javnaðu vit við síðsta sparkinum, og í Fuglafirði skoraðu vit sigursmálið í síðsta minuttinum. Vit hava havt marginalirnar við okkum, og eg vóni, at góða úrtøkan fer at síggjast aftur á avrikunum.